Leikrit



# Sjónissurnar

Landsmiðstøðin

**Sjónissurnar**

Skrivað: Mette Lund

Tónleikur: Torben Thøger

1991

Týtt: Jógvan F. Poulsen

**Leikarar:**

Sjórænarar:

Gullklaffi Kapteynur

Frikadellusmiðurin

Freka Frøkun Frøkna (eisini Pappageykur)

Virgar Vagg (eisini Gullokki kongsdóttir)

Rænus

Nissurnar:

Smædni Sjúrður

Alvi

Baldvin

Djóni

Skipsrottan Silja

Fyrsti partur

( Allir sjórænarnir uttan Frikadellusmiðurin koma syngjandi inn á pallin - dragsandi sekkir við tjóvagóðsi )

Allir ( Syngjandi Sjórænarakomuna ):
Sjórænarapening í stóra skál,
hávatenn, — romm er gott.
Tarnagassið í litramál,
vit vinna stórt og alt smátt!

( Sjórænarnir seta sekkirnar frá sær. Frikadellusmiðurin kemur fram )
Virgar Vagg: Oy,oy tú villa makrelsalat, vorðið sum fongur.
Frikadellusmiðurin: Hava tit fingið makrelsalat?
Virgar Vagg: Nei títt bítta trog! Gull hin gamli gull í sekkjatal
Rænus: Ja, og nú skulu vit avstað, áðrenn Fekt kongur sendir sína menn eftir okkum.
Freka Frøkun Frøkna: Eitt skal eg siga tær Rænus, at hann Fekt kongur er so ríkur, at hann ikki varnast at gull hansara er horvið, og um so er - so eru vit ikki rædd fyri hermonnum, ella?
Rænus: A nei tú - lat teir bert koma! ( Veipar við ørmunum, men steðgar brádliga, ta ið tey hoyra higstran frá einum sekki ).
Frikadellusmiðurin: Tú allar søtasta, eisini hetta, hava tit eisini rænt gull, sum grætur?
Rænus: Ans-, ansa eftir - tað kann vera vandamikið.

Gullklaffi kapteynur: Nú, nú - hyggið nú - tað ger tykkum bilsin.
Tit kunnu kalla tað jólagávu hóast lítið útliðið, men henda gávan kann ikki goymast.

( Øll rópa og fegnast. Baldvin kagar inn. Kapteynurin loysir kjaftbandið, og væna kongsdóttirin kemur til sjóndar )

Øll: Neiiiii!!!

(Gullklaffi kapteynur lyftir bilsnu kongsdóttrina upp í loft og setir hana upp á kokkhúsið. Varliga fara tey ein fyri og annar eftir yvir ímóti henni og nema við hana ).

Virgar Vagg: Og - eh, hvussu eitur tú so Gullhár kongsdóttir?

Vanilja: Eg eiti ikki Gullhár, men Vanilja kongsdóttir.

Freka Frk Frøkna: Og veit hon hvar hon er, kongsdóttir Vaniljukrans?

Vanilja: Eg eiti ikki Vaniljukransur - bert Vanilja - og eg eri á einum skipi, men hvørji eru tit?

( Øll tosa í holi á øðrum ).

Gullklaffi kapteynur: Nú, nú mínir menn - her skal skil vera í.

( Hann fer undir at syngja Sjórænarakomuna ):

Gullklaff er navn mítt
sterkt og einki putl.
Mítt skip hevur fulla last
av diamantum, silvur og gull.

Øll:

Sjórænarapening í stóra skál,
hávatenn, - romm er gott.
Tarnagassið í litramál,
vit vinna stórt og alt smátt!

Frikadellusmiðurin:

Táið hungur hóttir,
vit saman tú og eg,
fáa vit salt og flesk.
Frikadellusmið rópa tey meg.

Øll: Sjórænarapening í stóra skál,
håvatenn, - romm er gott.
Tarnagassiđ í litramál,
vit vinna stórt og alt smátt!

Rænus: Rænus bert nevn meg,
men tađ, tađ er júst eg.
Viđ knívi bestur er
og syngi ohoy viđ ferđ.

Øll: Sjórænarapening í stóra skál,
håvatenn, - romm er gott.
Tarnagassiđ í litramál,
vit vinna stórt og alt smátt!

Freka Frk Frøkna: Um bardagi umborđ er
eg fari uppí viđ ferđ.
Ver vinur eg ávarđi teg.
Freka Frk Frøkna tađ eri eg.

Øll: Sjórænarapening í stóra skál,
håvatenn, - romm er gott.
Tarnagassiđ í litramál,
vit vinna stórt og alt smátt!

Gullklaffi kapteynur: Ja hetta eru vit, fleiri eru ikki her umborđ. (Smædni Sjúrđur kagar inn ). Men Vanilja sig okkum okkurt um teg sjálva.

Vanilja ( sjarrandi ): Sum nevnt eiti eg Vanilja kongsdóttir og fađir mín er kendi kongurin Fekt - og eg havi als ikki stundir at vera her umborđ, tí jólini eru í nánd og vit eru farin at prýđa borg okkara og áh ( grætur ). Tit mugu sigla meg heim.

Gullklaffi kapteynur: Møsn! Gevst viđ hasum sjarrinum, hetta er

sjórænaraskip, her gráta vit ikki, og tú verður verandi her umborð. Tú skalt fáa tað sum blomman í egginum, sum tað sømir seg eini kongsdóttir - ikki so mínir menn?

Øll: Aj, aj Gullklaffi kapteynur!

Gullklaffi kapteynur: Og um tú ikki steðgar hasum grátinum skal eg siga tær hví eg havi hesa lokuna fyri annað eyga.

( Mikil fagnaður og róp ).

Gullklaffi kapteynur: Jú, men lurta væl eftir. ( Øll seta ella stilla seg væl til rættis ). Tað var eina náttina fyri mongum árum síðani. Á havinum var blikalogn og øll umborð svóvu uttan eg. Vit høvdu júst verið í ræning og høvdu vunnið okkum mikið og mangt, - og eg sjálvur hevði kraddað mær ein so hendinga prýðiligan diamant, sum ein kóngsdóttir hevði átt ( hann vísir teimum ein stóran gimstein ) - íða og brim sum hann var vakur, stórur og tungur - jú, men eg sat og frøddist yvir mikla fongin, - tá knappliga - tit halda tað vera skrøgg - kom ein hendinga stórur pappageykur og settist á dekkið vid mína lið. ( Freka Frk Frøkna leikar pappageykur og setir seg við hansara lið). Tú óreini sjó - rænari, hugsaði eg,- ein pappageykur her langt til havs. Eg helt tað kundi ikki bera til. Men áðrenn nakran vardi fór hann at tala.

Pappageykurin: Nú her ert tú, Gullklaffi kapteynur.

Gullklaffi kapteynur: Hvør tramin ert tú?

Pappageykurin: Eg komi beinleiðis frá Gulllokk prinsessu, og hon hevur ræðuliga ilt í búkinum - ger ikki annað enn at gremja seg.

( Virgar Vagg leikar Gulllokk prinsessa ).

Gulllokk: Áh, áh, áh dett skil.

Gullklaffi kapteynur: Á so tað ger hon, og hvat kemur tað mær við?

Pappageykurin: Tað kemur so sanniliga tær við, tí tú hevur stolið diamant hennara!

Gullklaffi kapteynur: Ah, tað - ein slíkan týdningarleysan gimstein - faðir hennara er so ríkur, at hann bert kann keypa henni ein nýggjan.

Pappageykurin: Tad er júst tað, ið hann ikki er førur fyri, tí hetta er ein serstakur diamantur. Um hon ikki hevur hann, kann hon ikki eiga børn. Og tað sum verri er, fær hon ikki diamantin aftur innan eitt døgn, fer kraft diamantsins at søkkja skip títt við rottu, mann og mús!

Gullklaffi kapteynur: A, jú, jú - man hetta vera so. Eg havi reiðiliga og ærliga stolið henda gimstein og eingin og einki fær meg at lata hann av hondum.

Pappageykurin: So noyðist eg at vísa tær hvussu styrki diamantsins roynist.

Gullklaffi kapteynur: ( til áskoðarnar ) Og vita tit hvat ið síðan hendi? Øll skútan fór at ristast so tað var líkt til at bæði armar og bein fór at vera rist av.

Gullklaffi kapteynur: Steðga, halt uppat - eg trúgvi tær pappageykur, men er einki eg kann gera fyri at eg kann sleppa at eiga diamantin?

Pappageykurin: Jú, jú kanska er okkurt - men tí tekur tú ikki undir við.

Gullklaffi kapteynur: Royn - Eg taki undir við øllum, sum ger at eg kann eiga diamantin.

Pappageykurin: I lagi - lurta nú. Tað einasta sum gerst er at tú letur annað eyga í staðin.

Gullklaffi kapteynur: Annað, annað eyga, júmen.....Jú, men hvat eg eigi tvey.

( Øll aftur til sín leiklut ).

Virgar Vagg: Og hvat - hvussu gekst so?
Gullklaffi kapteynur: Jú, so pikkaði pappageykurin annað eyga úr, fór avstað við tí, og eg hevði gimsteinin eftir.
Ja, manning og Vanilja kongsdóttir, nú vita tit hví eg havi klaffa fyri annað eyga. Og nú fer Rænus at vísa tær hvar tú skalt sova. I nátt liggja vit fyri akkeri, so øll fáa sovið, tað hava vit uppiborið. I lagi......vit tørna inn.
( Virgar Vagg leggur seg í heingikoyggjuna, Freka Frk. Frøkna setir seg upp ímóti mastrini at sova, tummilin hevur hann í munninum. Hini fara niðurundir og hava sekkirnar við sær. Skipsrottan Silja kemur á pallin, hyggur rundan um seg og setir seg niður. ).
Silja: Ein kongsdóttir á einum sjóræ. naraskipi - nei, álvaratos - hesir sjórænarnir eru troyttandi. Hinvegin sæð so dámar mær væl, táið okkurt onkuntíð hendir - spennandi er at vita um hon Vanilja kongsdóttir fer at orka at vera saman við øllum hesum missháttu og skitnu sjórænarum.
Eg skal siga tykkum, at í grundini er hetta mítt skip, tí Silja skipsrotta hevur verið longst umborð av øllum - ja heilt frá teimum døgum ein kongur átti tað, men tað veit hann Gullklaffi kapteynur ikki av. ( Silja smoyggir sær út ).

Annar partur.

(Øll sova. Á pallinum svevur Virgar Vagg í heingikoyggjuni, snorkanin hoyrist væl. Freka Frk. Frøkna situr og svevur. Vanilja kemur sníkjandi upp á dekkið ).

Vanilja: ( til áskoðararnar ): Sova allir sjóræsnararnir?

Áskoðararnir: Jaa!

Vanilja: Tað var gott...... Hvat kann eg gera? Vita tit, at eg komi av eini oyggj, sum eitur Grannoyggin, tí har eru so nógv granntrø. Á hvørjum ári til jóla hanga vit ljós og góðgæti á øll trøini, so at øll oyggin, sum hon er, lýsir. Tit kunnu ætla, at tað er vakurt at síggja. Faðir mín eitur Fekt kongur, tí hann er stórur og tjúkkur og honum dámar væl søtt, serstakliga jólakonfekt. Á hvørjum ári hjálpi eg teimum at gera konfekt til øll sum búgva á oynni. Eg eri eisini uppi í, táið trøini skulu prýðast Mamma mín er deyð, so tað er eydsæð, at eg hjálpi pápa mínum við jólafyrireikingunum.

Men..... hvussu kann eg tað hesi jólini, nú eg eri á hesum lorta skipinum ( Hon fer at smágráta ).

Vanilja: ( Syngur Prinsessusangin ):

Hvaðan fær faðir mín hjálp
til jølatrø í ár?
Hvør skal rulla konfekt
til alla oynna nú?

Hvør skal syngja ein sang
nū bīđitīđ er long?
Hvussu sleppi eg burt
hiđani nū tū?

( Nissurnar koma inn. Vanilja sær tær ikki, og syngur sangin umaftur.).

Allar nissurnar: Ā nei, tađ er spell.

Vanilja: Nissur!

Djōni: Ja, er mær loyvt at siga hvørji vit eru, eg eiti Djōni ( hann bukkar ).

Baldvin: Eg eiti Baldvin ( Gnisar og nemur viđ hār hennara )

Alvi: Eg eiti Alvi

Sjūrđur: Eg eiti Sjūrđur.

Baldvin: Smædni-Sjūrđur - tak nū ī hondina ā kongsdōttrini.

Djōni: Sum tađ er gott at sīggja eina veruliga prinsessu.
Hoyr, ver nū ikki so hørm, vit skulu hjālpa tær.

( Hini nikka øll īđin ).

Vanilja: Vilja tit hjālpa mær heimaftur ā Grannoynna. Men hvussu kunnu tit klāra teir stōru og sterku sjōrænarnar? duga tit gand?

Alvi: Ganda! Nei ikki stōrvegis, men vit kunnu kanska finna uppā okkurt. Vit kenna rænarnar væl, hōast teir ikki kenna okkum, ella halda okkum vera til.

Baldvin: Nei, teir trūgva ikki at vit eru til ( flennir ) og tađ er gott.

Djōni: Gott, hvī sigur tū tađ?

Baldvin: ( flennir ): Tī, so kunnu vit arga. Ā, tađ er so langt sīđan vit hava argađ nakran - ja veruliga arga, meini eg.

Djóni: Ikki so býtt hugsan. Og so kunnu vit læra Smædna Sjúrð at arga.

Sjúrður: Meg? - júmen, tað havi eg ikki roynt fyrr.

Djóni: Nei, og serstakliga tí - tað er skylda tín sum nissa at kunna arga.

Sjúrður: Júmen, sjórænarnir, teir, teir........

Alvi: Ver tú róligur, vit skulu hjálpa tær, og nú vit hava við sjórænarar at gera mugu vit leita fram sterkan lút og úr tí fæst eitt sindur av gandi.

Vanilja: Ber tað til? - á, sum tað ljóðar spennandi.

Baldvin: Ja, heldur tú ikki tað?. Eg kann næstan ikki bíða ( spjálkar við beinunum )

Djóni: Bíðing verður eingin, tí vit byrja beinanvegin.

Baldvin: Á ja, hvørjum leggja vit fyri við? - Njósipulvuri? ( Leitar í lummum eftir tí ).

Djóni: Nei, nei,við sjórænarum mugu vit vera varin.Vit leggja fyri við Nissudreymasanginum.

Vanilja: Nissudreymasanginum?

Alvi: Ja, tað er ein sangur, sum fær sjórænarnar at droyma um nissur.

Sjúrður: Og tað dámar teimum ikki, tí teir siga, at nissur eru ikki til.

Baldvin: Júst so - og tí er tað teir fáa ófrið í magan.

Djóni: Ja, eru tit til reiðar?

Hinir: Ja

Øll ( Syngja Nissudreymasangin ):

Nissuligt, prýðiligt koddavor,
ein nissa í klingur her í títt hár.
Nissuligt, prýðiligt døgurðafat,
argingarnissur ei halda uppat!
O, tú sterki rænari
tú heldur teg vera kal.
I nátt tú ei droymir um leyvur,
men um nissur, sum arga teg væl.
Nissuligt, prýðiligt koddavor,
ein nissa í klingur her í títt hár.
Nissuligt, prýðiligt døgurðafat,
argingarnissur ei halda uppat!

( Meðan tær syngja tita tær um sjórænararnar og hvørva síðani.
Silja Skipsrotta hevur sæð alt úr einum horni og kemur nú fram ).
Silja: Eg veit ikki um eg orki at bíða til sjórænarnir vakna.
Nú sær tíbetur út til , at okkurt fer at henda á hesum rotna
skipi ( fer út ).

Triđi partur.

( Virgar Vagg og Freka Frk. Frøkna vakna ).

Virgar Vagg: Tađ var tō løgiđ.

Freka Frk Frøkna: Løgiđ, løgiđ.

Virgar Vagg: Eg droymdi nissur.

Freka Frk. Frøkna: Eg droymdi nissur.

Samstundis: Segđi tū nakađ?

samstundis: Nei - eg segđi einki.

Samstundis: Å, so var tađ helst tađ, eg hoyrdi.

Virgar Vagg: Nissur!

Freka Frk Frøkna: Nissur!

( Tey rista dreymin av sær. Rænus, sum er svøvnpísktutur, kemur fram ).

Rænus: Nissur!

Virgar Vagg & Freka Frk. Frøkna: Segđi tū nakađ?

Rænus: Nei, eg segđi einki.

Frikadellusmiđurin ( berandi mat ): Ja, so eta vit morgunmat. Hvussu er tađ tit síggja ūt, - tađ er līkt til, at tit hava droymt nissur.

Hini: Tvass........( slāa mōti honum ).

Virgar Vagg: Lat okkum fāa okkurt at eta.

Virgar Vagg: Eg havi hugsađ ......hví er hon Vanilja her umborđ?

Rænus: Hon er tō vøkur at skođa.

Freka Frk. Frøkna: Eg eri vīs ī, at Gullklaffi kapteynur hevur eina ætlan viđ hesum.

( Gullklaffi kapteynur kemur ).

Øll: Gōđan morgun, Gullklaffi kapteynur.

Gullklaffi kapteynur: Īđa og brot! sita tit gomlu og løtu sjōgarpar enn og eta morgunmat. Skūtan skal vaskast skīnandi rein, vit hava nū eina prinsessu her umborđ. Er tađ skilt?

Øll: Ai, ai, Gullklaffi kapteynur.

( Frikadellusmiđurin fer aftur ī kokkhūsid viđ mataravlopinum. Hini leita fram spann, sāpu, tvøgur og lappar. Gullklaffi kapteynur fer eisini ī kokkhūsiđ )

Virgar Vagg: Nū ja er kapteynurin farin. Ikki er neyđugt at øll strīđast samstundis. Nū fari eg viđ tvøguni og tū Rænus kanst fara ī heingikoyggjuna. Seinni skifta vit.

Freka Frk. Frøkna: Hvat tramin bagir tær. Tū sum um dagarnar tørnar so illa ūt.

Virgar Vagg: Vit mugu øll taka okkara tørn, halda tit ikki tađ?

( Hann fer undir at vaska og letst at detta um kustin, dettur fram mōti āskođarunum ).

Virgar Vagg: ( til āskođararnar ): Hȳssj, eg fekk als ikki ilt. Av, av, av.

Hini koma til hjālpar.

Virgar Vagg: Av, av, beiniđ, haldi eg havi keikt tađ.

Rænus: Kom eg skal hjālpa tær ī koyggjuna.

Virgar Vagg: Lat meg vita um eg fāi stigiđ til.

Rænus: Ikki talan um, tū skalt ī koyggjuna, so skal eg vaska dūrkiđ.

( Vanilja kemur inn og hyggur um seg er í góðum lag )

Vanilja: Góðan morgun.

Freka Frk. Frøkna: Núú, lagið betri í dag!

Vanilja ( smílist vendir sær út í salin ): Nú gloyma tit ikki

mína avtalu við nissurnar? Hýsh!

Freka Frk Frøkna: Sig mær hvønn tosar tú við?

Vanilja: A eg tosi fyri meg sjálvan. ( Setir seg væl til rættis

á kokkhústakinum, sum skuldi hon sæð onkra framførslu ).

( Øll uttan Virgar Vagg arbeiða dúliga. Silja kagar fram. Alvi

kemur til sjóndar, snýkir seg aftan fyri Rænus og flytir spannuna

soleiðis at hann bakkar beint á hana og skramblandi hvølvist hon

Freka Frk. Frøkna: Sig mær hvat tramin hugsar tú um!

Rænus: Eg skilji einki - eg setti spannuna her, hvussu ólukkan...

( kláar sær í nakkanum ).

Virgar Vagg(flennir): Nú, so má spannin hava fingið føtur og

farin til gongu ( flennir at tí hann hevur sagt ).Spannin, hahaha

føtur, hahaha.

Baldvin sníkir seg aftur um Virgar Vagg og hjálpir honum niður av

koyggjuni. Hini flenna. Virgar Vagg situr lotur á dúrkinum.

Rænus: Nú, heingikoyggjan hevur kanska eisini fingið føtur?

Virgar Vagg: Halt hol ( Leggur seg varliga aftur í koyggjuna ).

Nú, her er vist í lagi.

Baldvin kemur aftur sníkjandi, vaggar varliga, tað dámar honum til hann knappliga aftur endar á dúrkinum

Virgar Vagg: Hvat ólukkan bagir hasi koyggjuni?

Freka Frk. Frøkna: hon roynir helst at siga tær, at tú eigur at hjálpa til at gera skipið klárt.

Virgar Vagg: Eg skilji ikki petti, eingin alda í sjónum.

( Hann kannar koyggjuna gjølla og væl. Gullklaffi kapteynur kemur á pallin ).

Gullklaffi kapteynur: Nú hvussu gongur? Bagir heingikoyggjuni nakað, Virgar Vagg?

Virgar Vagg: Ja, stutt síðan datt eg á dúrkið - eg meini í nátt datt eg tvær ferðir úr sjálvt um eingin alda var í sjónum - og so var tað eg hugsaði.......

Gullklaffi kapteynur: Ja, hvat hugsaði tú virgar Vagg?

Virgar Vagg: Ja, so var tað eg hugsaði.....eh, øh, eg hugsaði helst einki.

Gullklaffi kapteynur: Hví tramin stendur tú so og skavast við hasi koyggjuni - til arbeiðis við tær.

( Djóni flytir spannuna, medan prátið hevur gingið so spannin nú stendur beint frammanfyri kapteynin ).

Rænus: Júmen, Virgar Vagg hevur fingið ilt í.........

Virgar Vagg: ( Froysandi millum tenninar ): Halt munn, kúla.

Rænus: Júmen,tú.......

Virgar Vagg: ( froysir so at Rænus skilir, at hann skal tiga ).

Gullklaffi kapteynur: Nú, Vanilja, hvussu hevur tú sovið í nátt?

Vanilja: Væl, takk, eg havi droymt tann fagrasta dreym um fittastu og stuttligastu nissur.

Gullklaffi kapteynur: Ja, tađ er gott - ass, eg meini sovorđiđ tvætl at droyma um, nissur eru ikki til.

Vanilja: Tí eri eg ikki so vís í.

Gullklaffi kapteynur: Fjas, eg vil ikki hoyra eitt orđ um nissur afturat her umborđ. ( Hann tra‎đkar uppí spannuna og dettur )

Hvat tramin Rænus tín stóra kúla, hví skalt tú endiliga seta spannuna har, sum eg skal ganga!

Rænus: Orsaka Gullklaffi kapteynur - men eg eri vísur í, at eg setti hana har.

Gullklaffi kapteynur: Og skuldi spannin kanska sjálv gingiđ higar.

Arsh (út)

Rænus: Eg skilji ikki eitt vet. Eg setti spannuna her.

Frikadellusmiđurin ( kemur viđ mati ): So er borđreitt. Hvussu er vorđiđ viđ tykkum, er nakađ hent?

Freka Frk.Frøkna: Nei ikki annađ enn at spanninar ,Rænus hevur havt, hava fingiđ føtur.

Frikadellusmiđurin: Føtur?

Rænus: Og heingikoyggjan hevur blakađ Virgar Vagg tvær ferđir út.

Virgar Vagg: Jú, tađ er okkurt gátuført viđ hasi koyggjuni.

Frikadellusmiđurin: Hon roynir óiva at siga tær, at tú skalt gera okkurt.

Virgar Vagg: Nú byrjar tú ikki eisini - kom lat okkum fáa okkurt í vombina.

( Sjórænararnir seta seg at eta. Djóni kemur á pallin ).

Djóni: ( út í salin ) Nú fari eg at gera alt meira gátuført. Nú

fari eg at oysa gandapulvur í mat teirra. Húsj ( Djóni fer yvir til Vanilju og teskar henni okkurt í oyrað ).

Vanilja: Hygg,- komið skundið tykkum, havið er fult av hávum.

Sjórænararnir: Hvat, hávar! ( Teir skunda sær yvir, meðan oysir Djóni gandapulvur í matin ).

Djóni ( út í salin) Og nú skal Gullklaffi kapteynur fáa størsta partin (út).

Frikadellusmiðurin: Hvar sært tú hasar hávarnar?

Vanilja: Tað var løgið, eg sá teir fyri løtu síðan.

Freka Frk. Frøkna: Prinsessur eiga ikki at vera umborð á einum sjórænaraskipi.

( Tey fara aftur at eta . Silja setir seg alspent at vita hvat nú fer at henda ).

Freka Frk Frøkna: ( Etur undrandi ) Hvat hendir, biksumaturin smakkar av lakress.

Virgar Vagg: Nú er tað tú, sum er í ørviti (etur). Maturin smakkar sum víngummi ( Etur gramliga, heldur tað vera stuttligt ) ( Rænus hyggur undrandi upp á tey bæði ).

Virgar Vagg: Et nú Rænus, kundi hent at matur tín smakkar sum Matador-mix.

Rænus: Heldur tú tað? ( Etur, spýtir ). Púff, smakkar sum steikt livur. Hvat ólukkan hevur tú gjørt vid matin, Frikadellusmiður?

Frikadellusmiður: Eg havi gjørt matin til sum eg eri vanur.

Gullklaffi kapteynur: ( inn við síni skál ) Eh, tú Frikadellu-smiður, hvaðani er handa nýggja uppskriftin uppá biksumat?

Frikadellusmiðurin: Hon er ikki nýggj.

Gullklaffi kapteynur: Hevur tú gjørt sum tú ert vanur?

Frikadellusmiður: Júst so Gullklaffi kapteynur.

Gullklaffi kapteynur: Tú hevur ikki latið nakað nýtt útí?

Frikadellusmiður : nei.

Freka Frk. Frøkna: nú, Gullklaffi kapteynur, matur tín smakkar fulkomuliga sum hann eigur, kanska eitt vet betur.

Virgar Vagg: Tað er altso okkurt mogið her umborð, fyrst er tað spannin og heingikoyggjan og nú maturin.

Rænus: Ja,- og hetta er hent eftir at vit rændu Vanillju prinsessu.

Gullklaffi kapteynur: Møsn - tað eru bara tit, sum drekka ov nógv romm, og Vanillja prinsessa, hon verður ikki leingi her umborð.

Freka Frk. Frøkna: Hvat, hvat verður av henni?

Gullklaffi kapteynur: Eg ætli at selja hana.

Øll: Selja hana!!!

Gullklaffi kapteynur: Ja, til góða vinmann mín Vitleysa kapteyn. Hann er farin at eldast nú og vil fegin hava eina vakra prinsessu. Hann er fúsur at gjalda nógvan pening fyri hana.

Rænus: Á, so tí var tað, tú stjól hana.

Gullklaffi kapteynur: Ja, for hundan. Ikki er hóskandi fyri prinsessuna at vera á sjórænaraskipi. Øll vera vit óð í høvdinum av tí.

Freka Frk. Frøkna: Hatta eru júst míni orð.

Virgar Vagg: Tað eru ikki vit sum eru vorðin svøk, men her hendi okkurt loyndarfult.

Gullklaffi kapteynur: Møsn, og nú vil eg ikki hoyra eitt orð aftur um loyndarfulla hending - tað er tíð at tørna inn. Góðanátt tit.

Øll: Góðanátt Gullklaffi kapteynur.

Freka Frk Frøkna: Eg haldi kortini tað er tryggari at onkur av okkum heldur vakt í nátt.

Rænus: Tað átaki eg mær.at gera.

Virgar Vagg: óført - so fari eg í heingikoyggjuna.

( Freka Frk.Frøkna setir seg eisini at sova á pallinum, tummulin hevur hon í munninum)

Fjörði partur.

( Tað er nátt. Rænus heldur vakt ).

Rænus ( Syngur Eg ansi eftir ):

Eg ansi eftir,
eg ansi eftir,
bæði til høgru og til vinstru
og eg vendi mær
knappliga.

So um eitt spøkilsi kemur nær,
so traðki eg á tess tær.
Tá tú skalt halda vakt
mást tú vera við,
við minsta ljóð-sig frá
og køv alt gandalið.

Vanilja ( kemur sníkjandi og vendir sær til áskoðararnar ):
Sova sjórænararnir?
Áskoðararnir: Nei!!
Vanilja: Anei, er tað so galið má eg fáa fatur í nissurnar.
( Vanilja fer. Djóni og Sjúrður koma inn á pallin ).
Djóni: Ja, Sjúrður, hetta er so tín fyrsta uppgáva einsamallur.
Sjúrður: Hvat hendir, um hann sær meg?
Djóni: Um tú ert heilt róligur hendir tað ikki. Lurta nú, her er eitt krúss av romm við svøvnpulvuri í. Tað einasta tú skalt gera er at seta tað til hansara so hann ikki varnast teg. So fer hann at

greiða tað, sum er eftir - I lagi?

Sjúrður: I lagi ( Djóni klappar niður á øksl hansara og fer ) Uttan at hann varnast meg!!!

Rænus: Hó, er nakar her? (Sjúrði eydnast í evstu stund at krógva seg) Eg helt meg hoyra onkran.

( Skipsrottan Silja kemur og Sjúrður verður kløkkur )

Sjúrður: Húsj - far burtur við tær.

Silja: ( Hart ) Skal eg hjálpa tær?

Sjúrður: Húsj - nei - á far nú áðrenn hann hoyrir okkum, hetta er fyrstu ferð eg skal royna meg einsamallur, og eg skal ikki hava nakra hjálp.

Rænus: Her er onkur ( hyggur rundan um seg).

( Sjúrður trýstir Silju til viks og gcymir seg ).

Rænus: Nú, tað er bert ein býtt rotta, burtur við tær. Eg skal ansa eftir - kúst.

Silja: Bert ein rotta' Tín kúbýtti ogmisshâttisjórænari ( fer út ).

( Rænus fer at syngja. Meðan hann syngur snýkir Sjúrður seg inn á hann Hann nær at benda seg niður hvørja ferð rænus snarðar sær á. Tá ið sanginum líðir væl eydnast Sjúrði at seta rommkrússið við Rænusar lið, síðan rýmir hann

Rænus ( Syngur Eg ansi eftir ):

Eg ansi eftir,
eg ansi eftir,
bæði til høgru og til vinstru,
og eg vendi mær
knappliga.

So um eitt spøkilsi kemur nær,
so traðki eg â tess tær.
Tâ tû skalt halda vakt
mâst tû vera við,
vid minsta ljōð-sig frâ
og køv alt gandalið.

Eg ansi eftir,

eg ansi eftir,
bæði til høgru og til vinstru,
og eg vendi mær
knappliga.

So um eitt spøkilsi kemur nær,
so traðki eg á tess tær.
So um eitt spøkilsi kemur nær,
so traðki eg á tess tær.

Rænus: Tað er tað, eg geri. Hó,- hvat tramin er hetta, hvaðani kemur hetta (luktar í krússið) Hetta er romm (ætlar at drekka) Nei, eg drekki tað ikki, tad er kanska eitrað. Og hvør skuldi kanska havt gjørt tað? Nissurnar kanska!!! Ha, ha ha, møsn, nissur eru ikki til. Áh, hvat, ein stórur og sterkur sjórænari sum eg kann saktans drekka eitt krúss av romm. (drekkur alt í senn) Ááh..... Nú her hendir helst einki um eg seti meg. (setir seg niður og sovnar)

(Vanilja kemur nú inn á pallin)

Alvi: Hatta greiddi tú væl Sjúrður.

Baldvin: Hi, hi, hi hann mundi varnast teg - ha! Men tú rýmdi undan sum eitt fok hvørja ferð. Fínasta slag!!

Djóni: Ja, Sjúrður væl gjørt, men hvat gera vit nú?

Vanilja: Ja, hvat gera vit nú?

Alvi: Vit mugu arga tey meira enn. Sjórænarnir eru vornir ó-
tryggir nú, men kapteynurin er eingin bløka.
Bladvin: Ah jú, skulu vit hava futt í. Djóni, ha?
Djóni: Róligur,róligur,kapteynin havi eg hugsað um.Tit hava
bitið merkið í at hann hevur klaffa fyri annað eyga?
Vita tit hví hann hevur tað?
Sjúrður: Øh, tí at hann er sjórænari.
Djóni:Nei.
Baldvin: Tí hann ikki toldi at síggja so nógv? Hi hi!
Vanilja: Nei,tí ein pappageykur hevur pikkað annað eyga úr,
tað hevur hann sjálvur sagt.
Djóni: Tað! er rætt so, og eg havi eitt hugskot, men tað fáa
tit at frætta um seinni. Fyrst mugu tit sáa meira iva í teir.
Vanilja: Jú men, vit hava ikki so nógva tíð tí eg hoyrdi
sjórænarnar tala um at selja meg til Vitleysa kapteyn so
skjótt sum gjørligt!
Sjúrður: Ah nei, er tað so galið, vit náa tað ikki.
Gullklaffi kapteynur er so snildur, vit náa tað ikki.
Djóni: Soleiðis mást tú ikki siga, hugsa tær, um tað verður so.
Vita tit hvat sjórænarnir fara at gera í morgin?
Alvi: Ja, eg veit. Eg hoyrdi Virgar Vagg og Rænus bølva og banna,
ta íð kapteynurin segði teimum, at teir skuldu hava vaskitørn
í morgin.
Baldvin: Vaskidag! Hví, teir hava vaskað alt skipið í dag!
Djóni: Vaskidagur hjá sjórænarnum. Tad er dagurin, ta ið teir og
klæði teirra verða vaskað.
Baldvin: Ja, og tað dámar ongum sjórænara hi, hi, hi, tað verður
stuttligt at síggja.
Vanilja: Jú, men tá id teir halda tað vera so

ræðuligt at vera vaskaðir, hví gera teir tað so?

Djóni: Tað er kapteynurin, sum ræður og hann hevur gjørt av, at ein vaskidagur skal vera um árið.

Vanilja: Jú, men hví?

( Silja kemur inn setir seg at lurta ).

Djóni: Ja, ta ið tú nú endiliga vilt vita tað, er tað tí, at einaferð fyri mongum árum síðan hevði kapteynurin ikki vaskað sær í eini 7 ella 8 ár. Einaferð teir høvdu rænt hópin av gulli og silvuri, høvdu teir ikki nóg nógvar sekkir við til alt góðsið, sum var. Kapteynurin gav tí boð um, at allir rænarnir skuldu fylla lummarnar og stappa so nógv gull, sum teir kundu fáa inn undir troyggjuna. Tað gjørdu so allir, og kapteynurin var so tilstappaður, at hann illa fekk gingið. Umborð aftur komnir sóu teir, at alt gullið hevði fest seg.

Alvi: Fest seg - hvussu tá?

Djóni: Tað skal eg siga tær, tað var grógvið fast. Klæðir teirra vóru so skitin, at gullið sat fast í teimum. Tað var vónleyst at fáa tað av aftur klæðunum.

Baldvin: Er gullið so enn fast á klæðunum?

Djóni: Ja, og klæðini liggja øll á botni í skattakistu skiparans.

Baldvin: Tíer tað at klæðini nú skulu vaskast á hvørjum ári?

Djóni: Ja, tí tað vil kapteynurin undir ongum umstøðum vita av aftur.

Baldvin: Á dúirnar, og í morgin er árligi vaskidagurin, so eru teir gronutir og tvitnir frammanundan. Tad verður besti argingardagur nakrantíð.

Sjúrður: Fara vit so at goyma klæði teirra ella okkurt líknandi?

Alvi: Ja, og nógv, nógv annað.

Djóni: Gloymið ikki at vit hava okkara nissubland, sum kann fáa einhvønn sjórænara at blanda og siga orðini skeivt.

Alvi: Hvussu verður í nátt? Skulu teir ikki fáa nissudreym?

Djóni: Sjálvandi skulu teir tað, eru tit til reiðar?

Silja: Skal eg hjálpa tykkum, eg kann kitla teir meðan teir sova?

Baldvin: Nei, títt býtta trog, tí so vakna teir. Á dú, ein rotta hevur ikki skil fyri at arga sjórænarar.

Silja: Hvat veitst tú um hvat ein rotta skilir ( Setir seg í ein krók at gronast ).

Djóni: Skulu vit fara at byrja nú?!

Øll ( Syngja Nissudreymasangin ):

Nissuligt, prýðiligt koddavor,
ein nissa í klingur her í títt hár.
Nissuligt, prýðiligt døgurðafat,
argingarnissur ei halda uppat!

O, tú sterki rænari,
tú heldur teg vera kal.
Í nátt tú ei droymir um leyvur,
men um nissur, sum arga teg væl.

Nissuligt, prýðiligt koddavor,
ein nissa í klingur her í títt hár.
Nissuligt, prýðiligt døgurðafat,
argingarnissur ei halda uppat!

( Nissurnar, Vanilja og Silja hvørva ).

Fimti partur.

Virgar Vagg svevur í heingikoyggjuni, Freka Frk Frøkna situr og svevur. Rænus somuleiðis. Tey vakna øll so líðandi )

Rænus: A tann høvuðpína.

Virgar Vagg: Dekan fari.

Freka Frk. Frøkna: A, nei.

Rænus: Eg droymdi nissur.

Virgar Vagg: Eg droymdi aftur nú nissur.

Freka Frk frøkna: Nissur!

Samstundis: Søgdu tit nakað?

Samstundis: Ha? nei.

Samstundis: Júú, eg droymdi nissur.

Rænus: Her ruggar ikki alt rætt.

Freka Frk Frøkna: Sig mær nú Rænus hvat var tað, sum hendi í nátt

Rænus: I nátt?! Ee, jú, tað hendi einki. Ikki annað enn ein rotta sum rusaðist her. Eg sang mín vaktarsang. Ja, og so drakk eg eitt krúss av romm.

Virgar Vagg: Romm - hvaðani fekst tú tað?

Rænus: Fekk tað? Ee, nei, tað var bara har.

Virgar Vagg: Var bara har? Tað var ikki har, ta ið vit tørnaðu inn. Vart tú niðriundir eftir tí?

Rænus: Nei, eg var á vaktini alla tíđina.......men,men hvađani kom tađ?

Freka Frk. Frøkna: Ja, hvađani?

Virgar Vagg: Altso, Rænus, tín hosa. Har var eitt krúss av romm, tú visti ikki hvađani tađ var, men so drakkst tú tađ. Kom tær ikki í hug, at tađ kundi vera eitrađ?

Rænus: Júú, tađ var júst tađ eg hugsađi, men so hugsađi eg eisini soleiđis - hvør kundi finna uppá slíkt, nissur?!

Virgar Vagg: Á so, nei, tær eru ikki til, men tú sovnađi, so at har má hava veriđ sovipulvur í, ha?

Rænus: Jú, men hvør dekan.......

Freka Frk. Frøkna: Tad er ringt at gita. Tad sum ræđur mest um nú er at hava bæđi eygu og oyru opin.

Virgar Vagg: Á, nei, nei, nei,

Freka Frk. Frøkna: Hvat bagir. Heldur tú tađ vera eitt vánaligt uppskot?

Virgar Vagg: Ja, nei. Men eg kom knappliga at hugsa um hvat dagur tađ er í dag.

Rænus: Hvør dagur tađ er? Tađ er hmmm, á nei, á nei, á nei.

Freka Frk. Frøkna: Sig mær, hvat bagir tykkum? ( Hyggur upp á teir, kemur eisini at minnast ). á nei, á nei, á nei.

Øll trý: Vaskingardagur!!

( Alvi og Silja kaga fram )

Gullklaffi kapteynur: Góđan morgun manninginl.....ja, ja, ja, eg veit fulvæl, mær dámar heldur ikki tankan. Men hugsiđ tykkum hvat henda kann, um vit ikki vaska okkum. Nú fara tit niđurundir og finniđ ambođini fram, so skeinki eg tykkum ein rommara.

( Øll fara. Kapteynurin fer í kokkhúsið eftir krússum.Baldvin kemur inn ).

Baldvin ( út í salin ): Nú skal eg geva teimum gandadrykk fyri góman. Hetta pulvurið ger, at teir siga eitt ávíst orð skeivt.

( Baldvin krógvar seg á pallinum ).

Gullklaffi kapteynur ( hevur 5 krúss í hondini): Nú hava vit krússini, so vantar bert rommið. ( Fer aftur í kokkhúsid ).

Baldvin: Og so eitt dism í hvørt krússið, so skulu tit fáa bæði kæti og skemt ( Út ).

Gullklaffi kapteynur: ....Og romm ( Stoytir og tømir fløskuna ). Soleiðis!

( Virgar Vagg, Freka Frk. Frøkna og Rænus koma dragsandi við Frikadellusmiðinum og vaskiamboðum ).

Frikadellusmiðurin: A, nei, nei nei,- Eg sigi nei, bums nei,- eg vil ikki vera vaskaður.

Gullklaffi kapteynur: Nú, skikka tær væl. Ein rættur sjórænari ger sum skiparin sigur, skilir tú tað?

Frikadellusmiðurin: Ai, ai Gullklaffi kapteynur.

Gullklaffi kapteynur: I lagi, so byrja vit við einum krússi av romm. ( Allir fáa ). Skál.....og lat okkum fáa vaskingina frá hondini sum skjótast.

Hinir: Skál! ( Teir drekka ).

Virgar Vagg: Nú, lat okkum fáa hetta liðugt. Rænus tveit!( Hann tveitir honum vaskiamboð ).

( Virgar loftar og fer at lofta við teimum ).

Gullklaffi kapteynur: Ja, ja, Virgar Vagg, spæl tær eina løtu, men alt skal vera vaskað áðrenn ein tími er farin.

Virgar Vagg: Ai, ai Galklaff klupteynur.

Gullklaffi kapteynur: Hvat sigur tú?ver nú ikki frekur hin gamli

(Virgar Vagg missir vaskiamboðini. Baldvin tekur bustina og heingir hana í mastrina.)

Virgar Vagg: Orsaka, eg meinti Gulklip klapteynur. Nei, nei Galklump klytteypir. Hvat dekan hendi mær, tungan ballast hvørja ferð eg nevni klupteyn (slær seg fyri munnin, og er fyri ongum)

Gullklaffi kapteynur: Sig mær nú er tað tí vit hava vaskidag, at tú ert so illa fyri? Rænus kanska tú hjálpa Virgar Vagg, hann er vitleysur.

Rænus: I lagi, Gullklump klytteynur

Gullklaff kapteynur: Hvat dekan ætla tit, halda tit meg fyri gjøldur?

Rænus: Orsaka, tað var ikki ætlanin Gullklipp kapteynur.

Gullklaffi kapteynur: Nú er nóg mikið, skikkið tykkum væl og tað í stundini. Sigið hart tað sama sum eg nú,.....Galkatt kapteynur.....á nei, nei,nei, hvat hendir her, eru øll gandað?

Freka Frk. Frøkna: Eg havi varhugan av at onkur ella okkurt heldur okkum fyri gjøldur.

Gullklaffi kapteynur: Møsn, og hvør skuldi tað verið; Freka Frk. Frøkna? - Her eru bert vit her umborð. ( Silja kagar fram ) ja, og so eisini ein rotta.

Freka Frk. Frøkna: Eg veit ikki Gullkat klipteynur, men......

Gullklaffi kapteynur: Nú vil eg ikki hoyra meira møsn og tvætl, nú fari eg niðurundir at vaska mær, og áðrenn tímin er farin eru tit liðug, er tað skilt?

Øll: I lagi Galklap klupteynur.

Gullklaffi kapteynur: Oy oy(fer niður).

Virgar Vagg: Tað er rætt sum Klipteynurin sigur, nú mugu vit spíla okkum út og vaska okkum. Nú seta vit vaskibaljuna her - sápuna soleiðis og vaskibustina .... Hvar hundin er hon nú. Also Rænus, hvar legði tú hana?

Rænus: Eg? Eg havi ikki lagt hana nakra staðni, tað var tú sum royndi at lofta við henni:

Virgar Vagg: Hvar í ólukkan man hon vera? Fyri løtu síðan var hon her. Frikadellusmiður, tú situr bert og pilkar nøs, Veist tú ikki hvat er vorðið av henni?

Frikadellusmiður: Nú, nú, nú, leika ikki so í, onkustaðni her man hon vera.

( Øll leita ).

Freka Frk. Frøkna: ( Ber eyga við hana í mastrini ). Nei, hygga síggj, hon er uppi í mastrini - hvussu hundan er hon endað har uppi?

Rænus: Nú mugu vit royna at fáa gongd á hetta. Hví hongur bustin í mastrini? Tak hana for ólukkan niður, Virgar Vagg, tað var tú, sum endiliga skuldi spæla tær við henni.

Virgar Vagg: Eg havi ikki tveitt hana upp hagar?

Rænus: Tað ger mær tað sama, síggj nú til at fáa hana niðuraftur, so vit verða vaskað. Tit hoyrdu væl tað, Klupteynurin segði, - o nei, hví siga vit navn hansara skeivt hvørja ferð. Nú, tak nú hasa bustina niður.

Virgar Vagg ( tekur bustina niður ): Nú, nú, verið nú rólig Vit fara stillisliga og varliga undir vaskingina ( Djóni tekur sápuna )Baljan, bustin,......Rænus skalt tú fyrst?.....og sápan.....Nei, nei, nú veri eg í ørviti, hvar er sápan?

( Øll leita sum óð. Djóni leggur sápuna aftur, ímeðan tekur Baldvin baljuna).

Freka Frk. Frøkna: Nú, her er sápan.

Frikadellusmiđurin: Jú, men hvar er nú vaskibaljan? Ja, ja eg havi einki ímóti tí, bert eg sleppi undan at vaska mær. Nú fari eg í kokkhúsiđ at fylla fløskuna, so kunnu tit leita eftir baljuni. ( Fer ).

( Tey leita dúliga. Baldvin setir baljuna aftur ).

Virgar Vagg: Har er hon! ( Tey tveita seg oman yvir baljuna og halda rimmarfast ).Virgar Vagg: Nú hava vit hana, og nú skulu vit eisini hava hana.

Rænus: Nei, tak tú baljuna, so taki eg bustina. (Hann tveitir seg oman yvir bustina og heldur henni ). Og nú tú Frk. Frøkna skunda tær nú hin gamla, áđrenn hon hvørvir aftur, nú skunda tær!

Freka Frk. Frøkna: Ja, ja, tú ert púra villur ( Tveitir seg oman yvir sápuna ).

Virgar Vagg: So, nú hava vit alt, so byrja vit, Rænus tú ert fyrstur ( Rænus letur seg úr jakkanum. Frikadellusmiđurin kemur garvillur rennandi og skrálandi úr kokkhúsinum )

Frikadellusmiđur: Onei, hjálp, hjálp!

Freka Frk. Frøkna: Nú, nú, róligur.

Frikadellusmiđur: Róligur, skal eg vera róligur, stuttligt, ógvuliga stuttligt. Hevdi tú veriđ róligur, um alt í tínum køki knappliga flutti seg?

Freka Frk. Frøkna: Flutti seg?

Frikadellusmiđur: Ja, hvørja ferđ eg skuldi taka rommfløskuna flutti hon seg. Til endans fekk eg hana.

( Heldur ovurfegin rommfløskuna inn at sær ).

( Sjúrður hevur í øllum hurlivasanum verið og tikið jakkan hjá Rænusi. Hann at leita. Virgar Vagg heldur enn av allari megi fast í baljuni ).

Rænus: ( Næstan niðurundirkomin ) Nei, hoyrið nú, jakki mín er horvin ( leitar mutlandi fram fyri seg ) Jakki mín, jakki mín, mín kæri jakki, hvar man hann vera?

( Samstundis gongur Frikadellusmiðurin í klingur kroystandi rommfløskuna inn at sær . Rænus, Frikadellusmiðurin og Freka Frk. Frøkna seta seg stutt eftir sjarrandi niður nær við har Virgar Vagg situr ).

Gullklaffi kapteynur kemur upp vaskaður og vælgreiddur, jakkan hevur hann í hondini. Tað er ferð á honum, hann sær so løgin út. Hann prátar fyri seg sjálvan )

Gullklaffi kapteynur: Hvat dekan hendir her?
Ongantíð havi eg vitað um eitt slíkt snarvask fyrr, tað er sum onkur hevur hjálpt mær. Men hvat skuldi tad verið? Tvass, tað er bert eg, sum eri móður.

( Baldvin sníkir seg aftan á kapteyninum.Hann skal lata seg í jakkan, men Baldvin bronglar alt, tí hann heldur í ermunum, so hann ikki finnur tær. Endiliga er hann í jakkanum og fer at knappa. Aftanfyri stendur Baldvin, hann stingur armar sínar fram undan, so tað sær út sum hevur kapteynurin 4 armar. Kapteynurin knappar, Baldvin knappar uppaftur. Kapteynurin er liðugur og er vælnøgdur, men varnast, at jakkin er opin. Hann fer aftur at knappa, men úrslitið er tað sama. 3. ferð fylgir hann væl við tí, hann ger og sær,at hann hevur 4 hendur. Hendurnar kláa honum í høvdinum, pilka nøs o.s.fr. Fingrar á hinum hondunum bresta frammanfyri eygunum og og hann missir vitið. Baldvin rýmir. hinir sjórænarnir hava málleysir hugt at hesum ).

Freka Frk. Frøkna: Var tað ikki.......

Rænus: Jüü, tað var kliptunurin.......

Virgar Vagg: Ja, og var tað ikki eisini ein ni...

Freka Frk. Frøkna: Jü, tað var eisini ein......

Øll: Nissa! Hjälp, lat okkum rýma!

( Nissurnar koma á pallin ).

Baldvin: Á dü, sum tað gongur, söu tit sjörænarnar?

Djöni: Ja, nü er ikki leingi fyrr enn vit hava buktina og báðar endarnar.

Alvi: Hvussu við kapteyninum nü hann er moyrknaður.

Sjürdur: Nei, ikki rættiliga er hann tað, hann er bert fallin í övit, og minst nü til at Djöni hevði eina ætlan við honum.

Djöni: Væl minnist tü Sjürður, burtur ür tær spyrst skjött ein rættilig argingarnissa.

Sjürdur: Ah,...

Djöni: Jü, tü hevur klárað teg væl,og tí skalt tü sleppa at skipa fyri tí seinastu argingini við kapteyninum.

Sjürður: Skal eg arga kapteynin? tað tori eg ikki.

Baldvin: Á jü, kom nü Sjürður, tað er ein frálíkur møguleiki.

Djöni: Lurta nü fyrst hvør ætlanin er. Minnist tü at eg hevði eitt hugskot viðvíkjandi tí klaffi,kapteynurin hevur fyri eygað?

Hini: Ja.

Djöni: Nü fert tü Sjürður til kapteynin, flytir klaffan av eyganum yvir á hitt, so heldur hann seg vera blindan, tá ið hann vaknar.

Baldvin: Ja tü, hetta er nakað av tí rætta.

Alvi: sum tađ er væl funnið uppá. Tú flytir bert klaffin, so heldur hann, at hann er blindur.

Djóni: Ja, ja, nú er nóg mikið prátađ. Sjúrđur, tú kanst fara í gongd.

( Sjúrđur sníkir seg til kapteynin og flytir klaffan ).

Djóni: Komiđ, vit seta okkum at lúra og vita hvat iđ hendir, ta iđ hann vaknar.

Gullklaffi kapteynur: ( vaknar so líđandi ) Nú hvat dekan, eg síggi einki ( reisist og vasar á pallinum ) Hjálp! hjááálp! eg eri blindur. Hjáááp! eg síggi ikki eitt vet, ikki eitt tađ ~~einsta~~ petti, hjáálp!!

( Hinir sjóræ narnir koma tuskandi )

Virgar Vagg: Júmen, ~~Galklap~~ Klupteynur hvat er hent?

Gullklaffi kapteynur: Eg eri blindur, tín hosa, Hjálpiđ mær for hundarnar, hvat skulu tit gera viđ einum blindum kliptuni?

Rænus: Ert tú blindur, soleiđis rættiliga blindur?

Freka Frk. Frøkna: Tađ eru nissurnar.

Gullklaffi kapteynur: Møsn! hvat sigur tú?

Freka Frk Frøkna: Eg sigi, tađ eru nissurnar, vit hava sjálv sæđ tær. Tá iđ tú lat teg í jakkan var ein nissa aftanfyri teg alla tíđina.

Gullklaffa kapteynur: Einki petti leggi eg lag í hvør stóđ aftanfyri meg, tá iđ eg lat meg í jakkan, bert tit hjálpa mær, so eg fái sjónina aftur.

Virgar Vagg: Eg óttist fyri, at vit fáa ikki hjálpt tær uttan nissurnar eru viđ.

Rænus: Ja, tađ er bumbusikkurt, at tađ eru nissurnar

Gullklaffi kapteynur: Eg leggi ikki petti í hvør

skal hjálpa mær, ja um tađ so eru nissurnar. Bert eg fái sjónina aftur. ( grætur næstan ).

Freka Frk. Frøkna: ~~Dek~~an fari hvussu fáa vit fatur í nissurnar?

( Nissurnar, sum alla tíđina hava lúrt, ~~kona~~ nú fram ).

Djóni: Tađ er lættasta søk í heimi, tit skulu bert trúgva, at vit eru til, og tađ gera tit nú - ha?

Freka Frk. Frøkna: Møguligt, men nú skulu tit hjálpa okkara kliptuni. Samstundis kunnu tit hjálpa okkum burtur úr okkara talitrupulleika, tí tađ eru helst tit, sum hava gjørt at vit siga klutteynsins navn skeivt, ha?

Baldvin: Jú, so er og nú skal eg hjálpa tykkum. ( Slær tey øll á høvdiđ ). Soleiđis, nú skuldi veriđ í lagi.

Gullklaffi kapteynur: Sigiđ mær, hvat hendir her, hvønn tosa tit viđ?

Djóni: Er mær loyvt at siga hvør eg eri, eg eiti Djóni.

Gullklaffi kapteynur: Nú, um tú ert nissa, so hjálp mær at fáa sjónina aftur.

Djóni: Nei, nei, so lætt er tađ heldur ikki. Tú skalt lova høgt og heilagt at tú fert at sigla Vanilju prinsessu heim aftur.

Gullklaffi kapteynur: Júmen, hvussu so viđ øllum peninginum, eg kundi vunniđ, so hvørva teir sum døgg á morgni?

Djóni So er, men tađ er tađ einasta, tú kanst gera fyri at fáa sjónina aftur.

Gullklaffi kapteynur: Ja, ja, ja, for tramin, so noyđist eg at lova tađ.

Djóni: Viđ øllum tí, sum heilagt er?

Gullklaffi kapteynur: Ja, ja, viđ øllum sum heilagt er. Og lat meg so fáa sjónina aftur!

Djōni: Sjūrdur skalt tū?

Sjūrdur: Tađ geri eg viđ gleđi ( Flytir klaffan yvir ā hitt eygađ ).

Gullklaffi kapteynur: Ārsj, sīggja nissur soleiđis ūt? Komiđ mīnir menn, vit fara.

Alvi: Hatta var tađ, ā sum tađ var stuttligt.

Baldvin: Ja, og nū mugu vit finna Vanīlju prinsessu, so vit kunnu siga henni tey gōđu tīđindini.

Alvi: Ja, hvar man hon vera?

( Øll at leita. Silja skipsrottan kemur ā pallin ).

Silja: Ā dū, tađ er langt sīđan eg havi upplivađ so nōgv.

( Setir seg ).

( Vanilja prinsessa kemur ā pallin )

Vanilja: Sig mær hvī er eingin her, hvat er hent?

Silja: Tađ skal eg halda-eri eg eingin?

Vanilja: Orsaka, eg visti ikki at rottur kundu tosa.

Silja: Sjālvandi! Skipsrottan Silja dugir alt.

Vanilja: Hvar eru øll farin?

Silja: Spyr ikki meg, tey hvurvu bara.

Vanilja: Sleppi eg so ikki heim?

Silja: Spyr ikki meg, eg sigi einki, muđur mīn er læstur viđ 7 seglum.

Vanilja: Helst sleppi eg ikki heim.

Vanilja syngur Gleđilig jōl:

Sīggja ikki eg kann
fađir og trø ī ār
Helst eri eg nū seld
til vitleysan mann.
Nissusangurin her
tær argađu ferđ eftir ferđ?
Lat meg tō sleppa heim
til fađir mīn.

( Djōni og Freka Frk. Frøkna koma ā pallin )

Djōni: Hevur tū ikki hoyrt tađ?
kapteynur vil sigla teg inn.

Freka Frk Frøkna: Ā ja, tađ kann hann gera
uppā nulkomma, nulkomma fimm.

Bæđi: Ja lat okkum syngja nū øll somul,
so skūtan vagga kann gomul.
Vit ikki longur krūpa nū ī skjōl,
men ynskja tær eini gleđilig jōl.

( Nissurnar koma ā pallin )

Nissurnar: Hevur tū ikki hoyrt tađ?
kapteynur vil sigla teg inn.

( Sjōrænararnir og
Silja ā pallinum ): Ā ja, tađ kann hann gera
uppā nullkomma, nullkomma fimm.

Øll: Ja lat okkum syngja øll somul,
so skūtan vagga kann gomul.
Vit ikki longur krūpa nū ī skjōl,
men ynskja tær eini gleđilig jōl.

## Sjőrænarakoman.

♩. = 60
Forspil: De 4 sidste takter i B-stk.

Musik: Torben Thøger
Tekst: Mette Lund

© 1990




## Sjőrænarakoman.

♩. = 60
Forspil: De 2 sidste takter i B-stk.

Musik: Torben Thøger
Tekst: Mette Lund

© 1990




## Prinsessusangurin.

♩ = 100 - 104
Forspil: De 4 sidste takter i B-stk.

Musik: Torben Thøger
Tekst: Mette Lund

© 1990



## Nissudreymasangurin.

♩ = 126 - 132
Forspil: 2 takter G-dur (Rock'n'Roll)

Musik: Torben Thøger
Tekst: Mette Lund

© 1990




## Eg ansi eftir.

♩ = 54 - 56

Musik: Torben Thøger
Tekst: Mette Lund

© 1990



Eg ansi eftir.

♩ = 54 - 56

Musik: Torben Thøger
Tekst: Mette Lund

© 1990



# Gledilig jól.

♩ = 100 - 104
**Forspil: De 4 sidste takter i B-stk.**

Musik: Torben Thøger
Tekst: Mette Lund

© 1990




41
C
A7/c
3
G/d
H/d
Em
Am
Dsus4 D7
så vi fd
45
G
G7/f
C
Am7
C/d D7
G C/d
49
G
G7/f
C
Am7
C/d D7
G
fine